LM-087/2023

Fylgiskjal 1

Løgmálaráðið

Dagfesting: 13.02.2024
Mál nr.: 23/23990
Málsviðgjørt: JAK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 3. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Kapitlarnir 2-7 eru ikki galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum við einans listarligum, bókmentaligum ella journalistiskum endamáli. Tó eru §§ 41, 42 og 47 galdandi. *Stk. 4.* Kapitlarnir 2-7 eru ikki galdandi fyri viðgerð av persónsupplýsingum, sum eru í kunningardátugrunnum, sum hava journalistiskt endamál, og sum einans rúma tilfari, sum frammanundan er almannakunngjørt. Hetta er treytað av, at tilfarið í kunningardátugrunninum er óbroytt í mun til almannakunngeringina. Tó eru §§ 41, 42 og 47 galdandi.	**1.** Í § 3, stk. 3 og 4 verður "§§ 41, 42 og 47" broytt til: "§§ 41, 42 og 46".
§ 73. Dátueftirlitið kann almannakunngera síni úttalilsi og avgerðir. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt. § 36 er galdandi í mun til almannakunngeringina.	**2.** § 73, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Í avgerðum, sum Dátueftirlitið almannakunnger, skulu einstaklingar ikki verða nevndir við sínum navni."